gult10 cyan10 magenta10 svart10



# Flott vikuskifti á Hotel Vágum

**Stórslidnar útferðir, deiligt hotel, rimmar borðhald og dansur út á tann ljósa morgun fyri bíligan pening**

*Jústinus Leivsson Eidesgaard*

Nú er longu tíð at fara at hugsa um barnagentuna, er gerandisdagurin við at gerast alt ov tristur av súrum pliktum og bíleggja sær pláss til eitt svalandi vikuskifti á Hotel Vágum. Langt burtur frá irriterandi mobiltelefonum og rúgvuni av óloystum uppgávum, sum helst verða óloystar drúgva tíð enn, men sum geva ringa samvitsku og tyngja dagliga.

Starvsfólkið á Sosialinum var ein túr á Hotel Vágum seinasta vikuskifti. Vit høvdu keypt eina pakkaferð, sum fevndi um flutning til og úr meginøkinum, mat og uppihald, dans um kvøldið og útferðir.

Og vit vóru ikki einsamøll. Fleiri onnur høvdu fingið sama hugskot og ein fullsettur bilur stevndi úr Havnini beint fyri middag leygarmorgunin, ávegis til Vestmanna. Vit koyrdu fram við eystara munna á nýggja undirsjóvartunnlinum, sum gjørdi hendan túrin í bussinum eitt sindur sorgblídnan. Um stutta tíð, so verður tað so skjótt at fara vestur í Vágar, at ein merkir tað ikki. Føroyar gerast minni og minni fyri hvørt framstig, sum verður samtykt á samferðsluøkinum og eg kann ikki lata vera við at hugsa. Fer betraða sambandið við Vágar at avtofta oynna, soleiðis sum tað hevur víst so so nógva aðrastaðir í landinum. Samferðslunetið í Føroyum hevur ongantíð verið betri enn tað sama, men hóast tað, so vísa seinastu tølini frá Hagstovuni, at Havnir bara bólgnar, nú eru yvir 17.000 íbúgvar í Havn og fólkatalið bara fellir í útjaðaraøkinum.

## Útferðir

Vit standa í túninum á Hotel Vágum. Frískligt veður, turt, men onkur dropi er inn í millum. Kanska hevði tað verið enn betri um Sosialurin hevur tikið okkara privata veðurmann við. Men honum barst frá.

Vit gera skjótt av, tí dagurin styttist og áðrenn sjálvan stuttleikan á hotellinum um kvøldið, skulu vit síggja vøkru Vágoynna.

Tríggjar eru útferðirnar, ein út á Trælanýpuna, hetta perversa stað, har útslitnir trælir í gomlum døgum vóru stoyttir oman. Men náttúran og vágamenn í dag eiga ongan part í hesi døkku søgu. Trælanýpan og náttúran har í nánd og sera vøkur og hugnalig.

Onnur ætla at taka seg niðan á Eggina fyri vestan í Sørvági, at skoða út yvir hesi prúðu fuglabjørg og skorar, sum hava vart Sørvág í túsund oman á túsund av øldum og væl meira enn tað.

Ferðalagið á Sosialinum ætlar sær til sjós, út at hyggja eftir prúða Tindhólmi, sum vit annars vanliga bara síggja hjartkipt, tá vit flúgva inn yvir óunniliga Sørvágsfjørð, tá hann er lágur í ættini og vit kenna at okkara seinastu tími er komin.

Hóast hann er eystan í ættini og tað skuldi verið besta ætt í Vágunum, so stendur brim upp í lundalandið vestantil á Tindhólmi. Á Gud sum her er vakurt. Tað rekur upp í ættina í Mykinesfjørði og har brýtur allastaðni.

Fuglur er at síggja og havhesturin og ritan eru longu í berginum, tey síggjast betur enn svartfuglurin í øllum hesum svarta og dimmgrøna.

Vit fara gjøgnum Dragasund vesturum og tað er kønir menn í sigla. Holusiglararnir úr Vestmanna við Silju og Barbaru vita hvat gera og ein staðkendur sørvingur, sum eg kenni sum stýrimann umborð á Maerskskipum, er við sum staðkendur. Siglingin er ógvuslig, men tað eru skilamenn sum stíla fyri og vit koma trygt fram, hóast tað rullar ikka onkra løtu, og onkur nýstur av berum ótta.

Her eru fullveldismenn við, sum fegnast um Havborgina fríðu, føðilandi, sum er brimbart og veðurbitið og sum hevði verið uppaftur lekrari uttan donsk bond. Og so eru eisini sambandsmenn við, sum halda, at tað vit nú síggja, er eitt deiligt og nydeligt petti av danska kongaríkinum, sum hennara majestæt kann vera stolt av. Og so eru onnur, helst fjøldin, sum halda, at tað vit nú síggja bara er deiligt og einki annað og sum ikki seta tað tey síggja í samband við nakað annað, sum liggur langt uttanfyri føðilandið.

Vit sigla kring Tindhólm koma inn í Pollin innanfyri Eiriksboga, har Vágamenn fyrr stungu grind niður. Her gongur ein fittur partur av góðu skaldsøguni hjá Heðin Brú fyri seg og vit síggja teir fyri okkum og tann vælsignaða grind.

Vit sigla eina løtu á Sørvágsfirði, eru úti undir lendingini í Gásadali og stevna síðan heim aftur.

## 30 rættir

Aftan á ein góðan lúr á hugnaliga hotelrúminum, er boðið til borðhald klokkan sjey um kvøldið. Undirritaði hevði eina løtu áðrenn roynd nýggja billiardborðið í kjallaranum og gleddi seg til onkran dyst seinni.

Sjálvtøkuborðið, sum stóð miðskeiðis í rúmunum, bognaði av mati. Har var alt sum tú kundi hugsa tær. Eg eri av tí áskoðan, at tá ein syndar í mati, so skal ein synda stórt og fólk syndaðu, so tað brakaði eftir í. Tey svangastu høvdu fingið sær tvær reisur upp á tallerkin, áðrenn tey seinastu sluppu fram at fyrstu ferð. Og tey stóðu nú og bíðaðu at sleppa framat triðju ferð.

Men har var nakað at taka av, og hóast dúgliga var gingið upp til alt góðgætið teir næstu tveir tímarnar, so fjaraði ikki av. Tá so tíggju sløg av køkum skuldu leggja lok omaná, tá var hendan løtan fullkomin. Borðhaldið endaði við, at tú hoyrdi okkurt køvt rop og geisp og so mannaðu vit okkum upp til náttina.

Um kvøldið var dansur við orkestrinum »All That Rain« og teir vóru deiligir. Náttin fór til dans, reyp, billiard og góðan vertskap, har fleiri vágafólk eisini høvdu leitað sær niðan á hotellið og prátið var hugnaligt.

Ferðin endaði sunnumorgunin við einum deiligum morgunmati. Øll herligheitin kostaði 700 krónur fyri fólkið og eg ætli mær aftur einaferð seinni í ár at slappa av á Hotel Vágum og at ganga ein túr í hesi deiligu náttúru. Vit skylda okkum sjálvum at forkela okkum eitt sindur, ikki sannheit.



*"Barbara" hjá Skúvadalsmonnunum í Vestmanna í tungari aldu út fyri Dragasundi.*

*Mynd: Jens Kr. Vang.*



*Her stendur hann, Tindhólmur, lítið broyttur síðan Føroyar vóru bygdar í fyri góðum 1200 árum síðan. Hann hevur staðið her seinastu 50-60 milliónir av árum.*

*Mynd: Jústinus Leivsson Eidesgaard*

gult11 cyan11 magenta11 svart11



# Í Býin


Kaggin
Hetta vikuskiftið
Spæla
Audio
www.kaggin.fo

Á matarseðlinum
LASAGNA 49,-
FRIKADELLUR 49,-
BAKAÐ EPLI 45,-
Livandi tónleikur
Hósdkvøld og fríggjakvøld
Ronnie & Sámal
Déjà-vu
Café Natúr
Tlf. 31 26 25

Felagið Tórshøll
Hetta vikuskiftið spæla
Hjún
Hvørt fríggjakvøld, leygarkvøld og sunnukvøld er
livandi tónleikur
Hugnakvøld verður leygarkvøldið kl. 19.30
Nú fleiri ódýrar eindir allar dagar
Felagið Tórshøll
Sverrisgøta 22
Tlf. 31 15 65

Manhattan
Fríggjakvøldið 27/4
Livandi tónleikur
Sámal & Ronnie
spæla
Manhattan

Njótið matin í okkara friðsæla og hugnaliga umhvørvi
Hotel Hafnia

Við Sosialinum
Í BÝIN

HESA VIKUNA
Ottar í Funnings. Hóskvøldið
14,95 pr. eind frá 21.00 til 22.00
Ottar í Funnings. Fríggjakvøldið
ladies night
14,95 pr. eind frá 22.00 til 24.00
Martin Kjærbo Leygarkvøldið
14,95 pr. eind frá 22.00 til 24.00
Sunnukvøldið »KARAOKE«
Kl. 21.00 – 23.30
FÓTBÓLTUR Á STÓRSKÝGGJA
Caféin hevur opið mán.–frí. 17.00–24.00 og leyg.–sun. 14.00–24.00
Club 20 Café
EISINI TANN BESTI Í LANDINUM
Búff Bernaise bert 69,–
v/salat, chips & bernaisesós
Discoteque
Club 20
Tinghúsvegur • Tórshavn • Tlf. 31 56 28
www.club20.fo

AUTO
-Dag sum nátt- -skjótt og gott-
-ALT DØGNIÐ-
BENZIN
DIESEL
KIOSK
AUTO
311234

NÁTT-BUSSURIN
hjá Øssuri Christiansen
Leygarkvøldið:
• Úr Vestmanna kl. 24
• Úr Tórshavn kl. 01
• Úr Vestmanna kl. 04
• Úr Tórshavn kl. 05
(Koyrt verður um Kvívík og Kollafjørð, tá fráboðan fyriliggur)
Onnur kvøld kann koyrast eftir avtalu
Tlf. 424254
Bussarnir:
Tlf. 287752 • 286254

Klaksvíkar Klubbi
• Sjávskapping verður frá kl. 19.00
UNDIRHALD
• Dansur byrjar kl. 24.00
UNDIRHALD
Klaksvíkar Klubbi
Tlf. 455481

fk Matseðilin